## DAGSINS MEINING

# Tað prutlar undir lokinum

Tað kann tykjast sum tað er farið at prutla undir lokinum í samgonguni hugsa vit um tey mongu úttalilsini frá samgongufólki seinastu vikurnar. Ósemja tykist vera um týðandi mál eitt nú Visión 2015, einskiljingar, Íslandssáttmálan og onnur mál. Hetta, at samgongufólk og samgonguflokkar eru ósamd og tjakast alment, er einki óvanligt. Soleiðis hevur tað altíð verið, og hevur hetta nakað at gera við, at vit í Føroyum hava politiska siðvenju fyri samgongum og ikki minnilutalandsstýrum. Sum kunnugt er minnilutastjórnin tann mest vanligi stjórnarformur í okkara grannalondum. Skipan við minnilutastjórnum virkar, so løgið tað ljóðar, ofta betri enn skipan við samgongustjórnum. Tað eru fleiri orsøkir til hetta. Ein orsøkin er, at við minnilutastjórn verða í einum valskeiði oftast allir flokkar tiknir við í politiskar avgerðir og politiskar semjur. Hetta gevur øllum flokkum ávirkan, og hetta ger, at ein stjórn sleppur undan truplum neyðsemjum, sum slíta uppá ideologiska støði hjá flokkunum.

Tað skerst ikki burt, at teir flokkar, sum mynda sitandi samgongu, eru ideologiskt sera ymiskir. Men teir hava hinvegin frá fyrsta degi verið samdir um nøkur grundleggjandi viðurskifti sum t.d. hvussu sjálvstýrismálið skal loysast. Tey flest mugu væl nú ásanna, at sjálvstýrismálið má loysast fyri eitt langt áramál fram. Flestu føroyingar munnu eisini vera samdir um, at tað hevur stóran týdning at fáa til vega eina breiða semju um ta loysn, sum flokkarnir koma til. Hesir spurningar eru ikki allir loystir og í uttanlandsnevndini er ósemja um nakrar týðandi meginreglur í yvirtøkumálinum og um Íslandssáttmálan. Ósemja er lutvíst um einskiljingarnar, hóast hesar ósemjur ikki tykjast at vera so stórar, at tær ikki kunnu loysast.

Einhvør samgonga tolir eitt vist mát av ósemjum. Eitt ávíst mát av ósemjum er enntá gagnligt, tí flokkar mugu sleppa at markera, at teir eru ymiskir. Men eingin samgonga tolir stórar ósemjur um grundleggjandi spurningar í óavmarkaða tíð. Halda ávísir tingmenn fram við at føra politiskar samráðingar gjøgnum fjølmiðlarnar og at grava skotgravir, so kann hetta føra til so stórar politiskar trupulleikar flokkana millum, at samgonguni í versta føri ikki er lív lagað. Tað gerst tí neyðugt, at tingmenn og flokkar gera upp við seg sjálvar, um eitt slit er tann prísur, sum ein vil rinda fyri at sleppa at halda fram við slíkum ideologiskum markeringum, sum vit nú eru áskoðarar til.

Landinum trýtur stabilitet og arbeiðsfrið. Víst prutlar undir samgongulokinum, men er tað skilagott at lata pottin kóka í eldin nú? Tað er lítið, sum bendir á, at veljarin og vinnulívið orka eitt valstríð her og nú. Samgonguflokkarnir eiga tí skjótast at seta seg við samráðingarborðið og finna semjur og síðan fara til verka og gera tann setningin lidnan, sum teir hava átikið sær mótivegis føroyska samfelagnum. Alt annað vildi verið ábyrgdarleyst. Men harfyri nýtast teir heldur ikki at lata andstøðuna standa uttanfyri. Hví ikki vísa sætt demokratiskt sinnalag og virðing og oftari at taka andstøðuna við í tilgongdina so ella so. Vit standa fyri stórum avbjóðingum sum samfelag, eitt nú í sambandi við altjóðagerðina. At lyfta í felag og standa saman um at fremja tær skilabestu loysnirnar er ikki ein veikleiki. Tað er tvørturímóti ein stór styrki.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# "Jeg har en plan"

HELGI ABRAHAMSEN



**Ein avleiðing av, at eingin langtíðarætlan er gjørd fyri samferðsluøkið er, at tað verður tann sum rópar harðast, ið fær sítt ígjøgnum, sigur Helgi Abrahamsen millum annað í lesarabrævi**

"Jeg har en plan", plagdi gamli bandaleiðarin, Egon Olsen at siga í filmunum um Olsen bandan, og sum oftast fullu hesi orðini longu sama dag sum hann slapp út um fongsulsmúrarnar. Hann hevði altíð ein "plan".

Hann setti sær mál, ið hann vildi náða, og í hesum yvirskipaðu málunum vóru nógvir smálutir, sum allir skuldu sampakka.

**Okkum manglar ein "plan"**

Er tað nakað sum okkum manglar í Føroyum, so er tað at hava ein "plan". Vit hava tað við at taka støðu til einstøk mál, og gloyma heildina.

Í 1987 løgdu tveir tingmenn úr Eysturoynni uppskot fyri tingið, um at gera eina langtíðarætlan fyri vegakervið í oynni. Ætlanin vann ikki frama, og tað var ikki sørt, at uppskotið varð hildið fyri gjøldur.

Eg skal ikki siga, at júst tann ætlanin hevði verið tann rætta, men má tó ásanna, at vit nú í ólukku mát eru vitni til, hvussu galið tað kann ganga, tá ein slík (ella líknandi) ætlan manglar.

**Norðoyatunnilin**

Tak bara Norðoyatunnilin sum dømi. Beint áðrenn løgtingsvalið í 2002, varð eitt ófullfíggjað uppskot borið niðan í tingið, tí umráðandi var, í skundi, at skaffa nakað av góðum valagni. At bilarnir sum koma upp úr holinum, eisini skulu leiðast ígjøgnum bygdina í Leirvík, høvdu forsprákararnir onga ítøkiliga ætlan um, og nú, fýra ár seinni, hevur politiski myndugleikin framvegis ikki funnið ein hóskandi "plan" um, hvussu hetta skal gerast.

**Tann sum rópar harðast**

Ein avleiðing av, at eingin langtíðarætlan er gjørd fyri samferðsluøkið er, at tað verður tann sum rópar harðast, ið fær sítt ígjøgnum. Borgarstjórarnir í Havn og Runavík hava longu verið úti og sagt, at um Leirvík fær tunnil undir bygdina, so skulu teirra kommunur eisini hava tunlar. Stuttligi spurningurin er, hvat so hendir, um Leirvík IKKI fær tunnil? Fara borgarstjórarnir í Havn og Runavík so eisini at sleppa kravinum um teirra tunlar ? Er tað soleiðis vit leggja ætlanir í Føroyum ?

**Skálafjarðartunnilin**

Skálafjarðartunnilin er nú eisini settur á skinnaran. Talan er um eitt projekt, sum ikki skal kosta landskassanum eitt oyra. Hetta ljóðar frálíkt, men tíverri sær út til, at feilurin í Leirvík er við at verða endurtikin, tí heldur ikki her er nøkur ætlan gjørd fyri, hvussu ferðslan skal leiðast til og frá tunnilsmunnunum. Tá tann spurningurin einaferð er fingin uppá pláss, er ikki vist, at ætlanin verður so ódýr fyri landskassan kortini. Men fyribils hevur eingin nakran endaligan "plan".

**Hví ikki brúka fyrimunirnar?**

Eitt er at bora undirsjóvartunnlar. Men tað sær tíverri út til, at fólk hava heldur ikki nakran "plan" um, hvat tunnlarnir skulu brúkast til. Í øllum førum skulu HF-skeiðini halda fram, bæði í Klaksvík og á Kambsdali eftir at Norðoyatunnilin er opnaður. Hvat av hesum støðum er betur egnað til slíkan skúla, kunnu vit altíð kjakast um, men tað kann ikki vera rætt, at vit skulu hava sama skúla báðumegin sundið, tá vit hava fingið ein tunnil tvørturum.

**Tríggjar skúlabyggingar og ein tunnil**

Nú frættist, at Nes kommuna fer undir at byggja skúla fyri 43,8 mió. krónur. Sjóvar kommuna skal eisini byggja skúla, og Runavíkar kommuna hevur somuleiðis ætlanir um skúlabygging. Samstundis arbeiðir ein tunnilsbólkur við eini ætlan um at binda fjørðin saman, soleiðis at fjarstøðan millum hesar stásiligu skúlabygningar verður lítil og eingin. Hetta hendir meðan allar framrokningar vísa, at barnatalið í Føroyum er í minking, tað vil siga, at tað er ivasamt, um vit nakrantíð klára at fylla hesar skúlarnar við næmingum.

Er tað eingin sum dugir at seta hesar fýra dýru verkætlanirnar saman í "ein plan", ella skulu vit enn einaferð gjalda í dýrar dómar, tí at føroyska samfelagið "manglar ein plan" ?

Hava vit ráð til tað?

# Búnaðarstovan

ØSSUR AV STEINUM

**Síðan Búnaðarstovan flutti á Búnaðardepilin í Kollafirði, hevur hon í lýsingum sínum nýtt Frammi í Dali sum staðarnavn.**

Hetta er skeivt. Tú skalt longur fram, áðrenn tú ert komin fram í Dal.

Har Búnaðarstovan er, verður kallað á Heygsfløtum. Dygst vestanvert Búnaðarstovuna rennur Rangagilsáin, og beint niðan fyri í Dalánni eru/vóru Skælingsløgini. Eitt fornminni, ið tað almenna sópaði burtur, tá farið varð at grunda fyri Royndarstøðini.

Her í Kollafirði eri mong staðanøvn gloymd ella eisini misbrúkt, síðan bygdin legði saman við Tórshavnar kommunu, tí má talast harðliga at av øllum, ið hava ans og eru góð við tey ymsu staðarnøvnini kring bygdina.Tey í Havnini gera hetta ikki fyri okkum. Sær er hond hollast.

Gott í tykkum á Búnaðarstovuni; Fáið handan skeivleikan rættaðan. Vilja tit ikki nýta á Heygsfløtum, so hava tit tó tveir aðrar møguleikar, ið her eru vístir á.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14$^{00}$


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.